Landsstýrismaðurin í vinnumálum:

# Gevandi fundur

**Serliga varð Semingsstovnurin nógv umrøddur á kunnandi fundinum hjá Vinnumálaráðnum týsdagin. Landsstýrismaðurin hevur valt at geva feløgunum á arbeiðsmarknaðinum longri skotbráð at koma við sínum tilmæli. Freistin er nú sett til 29.september**

KUNNING
*Páll Holm Johannesen*

Seinnapartin týsdagin helt Vinnumálaráðið kunnandi fund fyri pørtunum á arbeiðsmarknaðinum. Kunnað varð um nýggja uppskotið hjá Vinnumálaráðnum um at víðka heimildirnar hjá Semingsstovnin og at løggeva fyri einum føstum gerðarrætti.

Góð 80 fólk vóru møtt til fundin á Hotel Føroyum. Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, legði út við at kunna um nýggja uppskotið, og eftir framløguna, var høvi hjá feløgunum á arbeiðsmarknaðinum at gera viðmerkingar.

### Semingsstovnurin nógv umrøddur

Bjarni Djurholm fortelur, at serliga varð nógv kjakast um Semingsstovnin, og har vístu fleiri á, at hann við nýggja uppskotinum fær ov stórar heimildir.

Landsstyrismaðurin hevði undan fundinum væntað, at størsta kjakið fór at standast av fasta gerðarrættinum, sum kortini fekk hann ikki nógva umrøðu.

Bjarni Djurholm metir kunnandi fundin hava verið gevandi, og hann fer at taka viðmerkingarnar til sín.

Freistin hjá feløgum at geva sítt endaliga tilmæli um nýggja uppskotið hjá Vinnumálaráðnum varð sett til 25 august, men freistin er nú hon longd. Orsaka av summarfrítíðini, hevur landsstýrismaðurin valt at geva feløgunum á arbeiðsmarknaðinum freist til 29. september.

# Starvsmannafelagið setur seg ímóti Vinnumálaráðnum

**Størsta fakfelagið á almenna arbeiðsmarknaðinum vil ikki hoyra nakað um, at politiski myndugleikin leggur seg út í viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum. Formaðurin, Gunnleivur Dalsgaard, sigur, at tað eiga at vera feløgini sjálvi, sum koma til sættis um broytingarnar á føroyska arbeiðsmarknaðinum**



*Fleiri av fundargestunum gjørdust bilsnir av, at Starvsmannafelagið ikki var umboðað á kunnandi fundinum hjá Vinnumálaráðnum týsdagin. Í brævi til Vinnumálaráðið, sigur felagið seg als ikki kunna taka undir við mannagondini hjá politiska myndugleikanum*
*Mynd: Savnsmynd*

NÝGGJ ARBEIÐSMARKNAÐARLÓG
*Páll Holm Johannesen*

Tað vóru fleiri av fundargestunum, ið løgdu til merkis, at størsta fakfelagið á almenna arbeiðsmarknaðinum, Starvsmannafelagið, als ikki var umboðað á kunningarfundinum hjá Vinnumálaráðnum týsdagin. Í tíðindaskrivi til fjølmiðlarnar, hevur Starvsmannafelagið 15. august boðað Vinnumálaráðnum frá, at felagið hevði ongar ætlanir um at møta á kunningarfundinum.

### Skert frælsi

Í brævinum framgongur, at Starvsmannafelagið ikki kann góðtaka, at løggávuvaldið leggur seg út í skipanina á arbeiðsmarknaðinum. Víst verður á, at á føroyska arbeiðsmarknaðinum er frælsur avtalu- og samráðingarrættur galdandi, og við at løggávuvaldi ætlar leggja uppskot fram um løggeving, metir felagið, at hesi rættindi verða nógv skerd.

Starvsmannafelagið leggur í sama viðfangi afturat, at felagið ikki er ímóti broytingum á arbeiðsmarknaðinum, men, at hesar broyingar skulu fremjast sambært semju og avtalu millum sáttmálapartarnar sjálvar.

### Illa umhugsað

Starvsmannafelagið fýlist eisini á, at Vinnumálaráðið leggur fundin sama dag, sum felagið og Fíggjarmálaráðið skulu seta seg við fundarborðið, har semja skal finnast um nýggjan sáttmála. Felagið heldur mannagongdina vera sera illa umhugsað av Vinnumálaráðnum.

Starvsmannafelagið sigur eisini í niðurstøðuni í brævinum til Vinnumálaráðið, at tað ynskir, at politiski myndugleikin heldur seg langt burtur frá at løggeva á økinum, tí grundleggjandi rættindi verða skerd hjá fakfeløgunum

### Halda fast

Gunnleivur Dalsgaard sigur í viðmerking til tíðindaskrivið, at felagið hevur ongar ætlanir um at sleppa sínum greiðu sjónarmiðum á økinum.

Hann sigur, at felagið hevur endaliga viðgjørt uppskotið hjá Vinnumálaráðnum, og felagið fer ikki at broyta hugsan til 29. september, tá endaligu tilmælini hjá feløgunum á arbeiðsmarknaðinum skulu latast Vinnumálaráðnum.

– Vit eru sannførd um, at tað skulu fyrst og fremst vera feløgini sjálvi, sum blíva samd um nýggja lóg, og ikki politiski myndugleikin, sigur Gunnleivur Dalsgaard.

Spurdur, um søgan ikki hevur víst, at fakfeløgini og arbeiðsgevararnir megna ikki sjálvi at koma til sættis, svarar formaðurin í Starvsmannafelagnum, at tað hevur aldrin skortað á viljan hjá fakfeløgunum, og tað aldrin hevur verið nøkur verulig viðgerð av málinum.

Hann vísir á, at politiski myndugleikin hevur onkuntíð roynt at lagt uppskot fram, men talan hevur heldur verið um eina provokation, og tað kunnu fakfeløgini ikki taka tey fyri fult.

### Onga viðmerking

Starvsmannafelagið fór týsdagin undir lønarsamráðingarnar við Fíggjarmálaráðið.

Gunnleivur Dalsgaard vil einki siga, um hvussu tað gongur við samráðingunum við Fíggjarmálaráðið, og sigur seg ikki hava nakra viðmerking. Einasta vit fáa at vita er, at partarnir samráðast uttanfyri Havnina, og partarnir tosa leysliga saman um krøvini.

## Havnar Handverkarafelag stevnt fyrrverandi formanni

STEVNING
*Páll Holm Johannesen*

Havnar Handverkarafelagið hevur stevnt fyrrverandi formanni felagsins, Eyðfinni Petersen. Felagið metir seg hava rætt til ein ágóða hjá fyrrverandi formanninum. Advokaturin hjá Havnar Handverkarafelag vil ikki upplýsa, hvat fyri ágóða talan er um.

Rættarmálið er framvegis í fyrireikandi skeiðnum. Umboð fyri Havnar Handsverkarafelag og Eyðfinn Petersen hava skift um skrivlig skrivligt skjøl, og partarnir fáa nú høvi til leggja síni sjónarmið fram, áðrenn farið verður undir endaliga dómsviðgerðina.

Advokaturin hjá Havnar Handverkarafelag, Ólavur Jákup Kristoffersen, sigur seg vænta, at tað kann taka fleiri mánaðir, áðrenn rættarmálið endaliga verður avgreitt. Vit hava roynt at fingið eina viðmerking frá Eyðfinni Petersen, men uttan úrslit. Vit royna aftur til næsta blað.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Óli Jacobsen á Fiskimannafelagnum 60 ár



Í dag, 21 august, fyllir Óli Jacobsen úr Tjørnustovu, formaður í Føroya Fiskimannafelagi í meira enn trý tey seinastu tíggjuáraskeiðini og fyrrverandi landsstýrismaður, seksti ár.

Hesin sera virkni, evnaríki og á nógvan hátt sjáldsami maðurin er føddur tann 21.august 1943 í Kalundborg í Norðursælandi í Danmørk, har foreldrini hjá honum búðu undir krígnum. Faðir hansara, Vilhelm, f.1915, er ættaður úr Norðragøtu, har hann hevði verið bóndi í mong ár. Í dag býr hann á Ellisheiminum í Runavík. Móðurin, Elisa, fødd Joensen (Háberg), 1911-1997, var ættað úr Havn. Foreldur Óla giftust í 1942 og fingu tey seks børn. Umframt Óla, ið er elstur í systkinaflokkinum, eru tey Malan, f.1945, einkjan eftur Jonhardi Dahl-Jacobsen úr Syðrugøtu, búsitandi í Havn, Petur, f.1947, búsitandi í Århus í Danmørk, Elin, f.1949, gift við Pálli Vang av Tvøroyri og búsitandi har, Anna-Maria, f.1950, gift við Jákupi Sørensen úr Klaksvík, búsitandi í Hoyvík, Lissi, f.1957, gift við Henningi Hansen av Skála og búsitandi í Havn.

Tá ið Óli skuldi byrja í fólkaskúla, flutti familjan til Føroya og búsettist í Tjørnustovu í Norðragøtu. Tíðliga vísti tað seg, at Óli hevði áhuga fyri øllum tí, sum fyrifórst í samfelagnum, millum annað politikki og fiskivinnu. Fjúrtan ára gamal fór hann fyrstu ferð til skips. Sum ungur, gjørdist hann virkin í politikki og fakfelagsarbeiði. Í 1970 varð hann, bert 27 ára gamal, valdur til formann í Føroya Fiskimannafelagi.

Tað eru fleiri ættarlið av sjómonnum, sum hava stríðst ígjøgnum árini til tess at vinna Føroyum ríkidømi og vælferð í størstu vinnu landsins, nevniliga fiskivinnu. Men ferð eftir ferð sýndu eldri og yngri fiskimenn Óla Jacobsen álit sitt, tá ið teir aftur og aftur valdu hann til almenna umboðsmann sín í Fiskimannafelagnum. Sum fakfelagsformaður í skrivstovuni á Bryggjubakka, hevur Óli í samfull 33 ár vart áhugamál føroyska fiskimanna – bæði her heima og uttan fyri landoddarnar. Hann man vera tann persónurin í landinum, ið hevur sitið longst í einum og sama leiðarastarvi.

Óli hevur eisini í nógv ár umboðað Føroyar í Altjóða Felagskapi Flutningsmanna (ITF, International Transport Workers' Federation), har hann er deildarleiðari á fiskimannadeildini og ein av høvuðsráðgevunum. Í sambandi við fundir og ráðstevnur hevur Óli ferðast so at siga um allan heimin.

Kreppuárini kendi Óli seg noyddan til at fara uppí stórpolitikk. Hann fekk flestar persónligar atkvøður í Eysturoyar valdømi á Løgtingsvalinum í 1994. Hann sat í Løgtinginum fyri Verkamannafylkingina tað valskeið, umframt at vera landsstýrismaður í tveimum umførum: í 1994-1996 í ídnaðarmálum, handils- og vinnumálum, arbeiðaramálum, landbúnaðarmálum, tryggingarmálum og rættarmálum, og í 1998 í almanna- og heilsumálum, arbeiðaramálum, tryggingarmálum og rættarmálum.

Óli er kendur fyri at vera ein ógvuliga prinsippfullur maður, ið altíð stendur fast við sjónarmið síni og er til reiðar at verja tey alment. Óli hevur ongantíð gingið við rákinum. Heldur hevur hann altíð havt egnu sannføringarnar, sum hann ikki er bangin at koma fram við. Sama, um ein er samdur ella ikki við sjónarmiðjum hansara, hevur ein stóra virðing fyri hesum gløgga og sera erliga, idealistiska persóninum.

Óli hevur ein lættan penn og dugir at skriva um annað enn politikk og fiskivinnu. Tað mesta av tí fjølbroytta tilfarinum, ið vit kunnu finna í FF-Blaðnum, ið er málgagn Fiskimannafelagsins – frásagnir úr øðrum londum, samrøður, familjusøgur, søguligt tilfar og annað – kemur úr hondum Óla.

Óli úr Tjørnustovu er ein av teimum, ið stóran áhuga hava fyri føroyskari ættargransking og vita sera nógv um fólk í oyggjunum – bæði núlivandi føroyingar og forfedrar teirra.

Óli er eisini ein sannur Russlandsvinur. Hann hevur verið í Russlandi heilar átjan ferðir, og er hann ein av teimum heilt fáu føroyingunum, ið duga at tosa russiskt.

Tað tók Óla Jacobsen sína tíð at finna maka lívsins. Óli tekur onkuntíð skemtiliga til, at hann »fekk konuna í gávu á 12 ára føðingardegi sínum«. Og tað passar eisini! Kirstin er fødd tann 21. august 1955 og fyllir sostatt 48 ár í dag, sama dagin, sum maður hennara fyllir seksti. Kirstin er ættað av Eiði og er ein av fimm systrum. Hinar eru Marsanna, ið er gift við Pálli Heinesen úr Klaksvík og búsitandi í Havn, Susan, ið er gift við Annfinni Norðbúð úr Klaksvík og búsitandi í Hirtshals í Danmørk, Henny, ið er gift við Óla Karl Olsen úr Klaksvík og búsitandi har, og Erlina, ið er gift við Jann Johannesen úr Kaldbak og búsitandi har. Foreldur Kirstin eru Nikkel Nielsen, f.1922 av Eiði og Margith, f.Sørensen í 1925, ættað úr Porkeri.

Kirstin og Óli giftust í 1981. Síðan tá hava tey búð í góða, hugnaliga og sera gestablíða heimi sínum í Gríms Kambansgøtu í Havn. Børnini eru fýra í tali. Tey eru Linda, f.1982, trúlovað við Palla Skorheim úr Klaksvík, Kári, f.1983, Óli Jákup, f.1987, og Tróndur, f.1991. Tey seinastu árini hevur Kirstin starvast í Føroya Sparikassa í Havn.

Kirstin og Óli fylla sama dagin. Men tey eru kortini sera ólík av lyndi og í medferð. Og hetta er kanska tað, sum ger hjúnarlag teirra so lukkuligt, sum tað einaferð er.

Føðingardagsbørnini bæði eiga ein sera stóran og breiðan vinarskara. Og sannliga eru tey framúr góð vinfólk hjá einum at hava. Og tað eru nógv, sum hava havt eina stóra gleði at ásanna tað.

Góðu Kirstin og Óli! Tykkum verður heilsað so hjartaliga á føðingardegi tykkara.

**IE**




## Óli Jacobsen 60 ár

Í dag 21. august fyllir formaður Føroya Fiskimannafelags, Óli Jacobsen, 60 ár.

Óla hitti eg fyrstu ferð fyri 30 árum síðan. Tá var hann nývaldur sum formaður í Føroya Fiskimannafelag. Síðani tá hevur verið vinskapur og gott samstarv okkara millum. Ígjøgnum tíðina hevur Óli verið fiskimannafelagnum ein góður formaður, serliga á altjóða støði, har vit hava arbeitt nógv saman. Óli hevur brúkt nógva orku til at umboða sínar landsmenn og sítt land sum formaður í fiskimannadeildini í ITF.

Umframt alt hetta hevur verið ein einastandandi góður vinskapur millum okkara familjur. Eg, Nicolina og børnini senda honum, Kirstin, og børnunum kærar heilsanir á føðingardegnum.

Góði Óli, hjartaliga tillukku við 60 ára føðingardegnum og alt tað besta framyvir ynskja vit á Sjómannasambandi Islands

Lifðu heill

**Óskar Vigfusson**

## Dagurin

**21. august. Sálomon.** Til minis um hin vísa kongin Sálomon, sum sagt er frá í kapitlunum 1-11 í fyrru Kongabók í Gamla testamenti.
Navnið merkir *friður* og *vælferð.*